

# Praktikkblaðið





9.a

Skúlin við Løkin

Apríl 2010

# Innihald

Leiðari ... 3
Ein stramt angandi og litføgur starvsvenjing ... 4
Djór doyggja ... 6
Eitt starv við spenningi ... 8
Elektron - alt annað enn pappírleyst ... 10
Tá lívið er upp á spæl ... 11
MEST á Skála ... 12
BBR Service ... 14
Praktikk í frítíðarskúlanum í Rituvík ... 15
Rit&Rák ... 16
Simme musikhús ... 17
Sjólívið er sakin ... 18
Túrurin við polarhav ... 20
Farmakonomiskar upplivingar ... 21
TEKO - skapandi skúli ... 22
Formula.fo ... 24
Bakaríið ... 25
Tvær vikur umborð á einum trolara er lívið ... 26
Brimil ... 28
Matas ... 29
Landssjúkrahúsið ... 30

# Leiðari

PÁLIN OLSEN, FLOKSLÆRARI

Tú situr nú við einum blaðið í hondini, sum 9.a hevur latið úr hondum saman við flokslæraranum. Blaðið er ikki eitt reklamublað, ongin sponsorur hevur verið uppií, og greinarnar í blaðnum, eru ikki goldnar av fyritøkunum, har næmingarnir hava verið í starvsvenjing.

Greinarnar eru skrivaðar til tín, sum skalt velja tær títt praktikkpláss í 9. flokki. Næmingarnir hava skrivað greinarnar til tín, so at tú kanst fáa eitt innlit í, hvussu 9.a upplivdi sína praktikk.

Kanska fært tú onkur hugskot til, hvar tú kundi hugsað tær at farið í praktikk, tá tú hevur lisið blaðið.

2 vikur uttan skúlating man vera ynskidreymur hjá flestu næmingunum í føroyska fólkaskúlanum, sleppa undan at sita inni í 7 ferðir 45 minuttir hvønn í 10 dagar umframt at sita og gløða niður í skúlabøkur aftan á skúlatíð. Hetta er meira enn ein dreymur hjá næmingunum í 9. og 10. flokki.

Hesir næmingarnir fara ein túr út í veruliga lívið at royna seg á arbeiðsmarknaðinum í 2 vikur. Og tey hava veruliga fingið roynt seg.

Onkur vaksin heldur kanska, at 2 vikur høvdu verið betri brúktar í skúlanum. Men spyrt tú næmingarnar, tá teir eru afturkomnir, halda øll, at prakikktíðin var gevandi.

Summi hava funnið útav, hvat skal vera teirra lívsstarv, og onnur funnu útav, at tað, tey høvdu droymt um, skuldi vera teirra lívsstarv, var ikki tað, tey væntaðu, og kanska onkur fann útav, at tað er ikki so gali at ganga í skúla hóast alt.

Men øll fingu roynt seg. Tey hava gjørt alt frá at pilka innvøl úr fiski til at fáa stór skip inn í dokk og til at bera vøru, so at armarnir kendust sum blýggj.

Vit læra øll av okkara lívsroyndum, og næmingarnir í 9.a eru nú hesar lívsroyndir ríkari, sum teir lata teg fáa ein part burturav.

Góðan lesihug.

# Ein stramt angandi og litføgur starvsvenjing

*Fyri umleið einari viku síðan vóru næmingarnir í níggjunda flokki í skúlanum við Løkin liðug at vera í starvsvenjing. Eg var í starvsvenjing saman við einari aðrari úr 9.b. Eg var í vælverustovuni Monroe við Streymin, har tey hava nógv at bjóða: Make-Up, Mýking & Spa, tannrøkt og hárviðgerðir. Hetta var ein sera spennandi tíð, og kvinnurnar, sum arbeiddu har, vóru heilt ómetaliga fittar og dugnaligar. Tíðin, eg var har, gjørdi, at eg fekk ætlanir um at gerast frisør í framtíðini.*



JÓRUNN HANSEN

Jorunnhansen94@hotmail.com

**Vælverustovan Monroe við Streymin** er ein frisørsalong og vælverustova saman. Konan, sum eigur vælverustovuna, eitur Elisabeth Maria Danielsen og er frisør og make-up artist í salongini. Hon er ógvuliga fitt at arbeiða saman við og klárar væl at hava nógv um hendurnar.

Í Monroe eru sjey starvsfólk, og alt er konufólk. Har eru tvær, sum bara eru frisør, tríggjar, sum eru frisør og make-up artistar, ein, sum er kosmetologur og húðrøktari, og ein, sum er fjórðaárs frisørlærlingur og sniðgevi.

Tær arbeiða nógv fyri at gera kundarnar nøgdar. Tá ið ein kundi kemur inn í gjøgnum hurðina, hava tey brúk fyri, at onkur sigur "hey" við tey. Tað er ómetaliga vigtugt, at kundin følir seg væl. So spyrja tær, um tær skulu taka jakkan og heingja hann í garderobuna. Tær bjóða teimum at seta seg í frisørstólin og spyrja so, um tey vilja hava kaffi ella lakresste. Tað er eitt spesielt te, sum bara vælverustovan Monroe hevur at bjóða.

Tá ið kundarnir skulu til vaskið at vaska hárið, fáa teir altíð massagu í hárbotnin. Tað er lekkurt, og man slappar ordiliga av.

Ímeðan onkur kundi sat við liting í hárinum og skuldi bíða eina løtu, fingu tey hond-massagu frá okkum, sum vóru í starvsvenjing. (so lærdi man eisini tað).

Alt inni í Monroe *er reytt og svart, eins og myndin omanfyri, ið er á øllum vindeygunum hjá teimum.*

So vælveran er í øllum førum góð har.

**Helt tað verða ov óinteressant, bara at fara í ein klædnahandil**

At byrja við ætlaði eg at fara í starvsvenjing í Trend Floor, sum er ein móta- handil í Saltangará. Men tá ið eg hevði hugsað meg eitt sindur um, fann eg útav, at tað kanska var ov óinteressant bara at vera í einum klædnahandli. Har leggur man kanska klæðir saman og støvsýgur. Eg havi altíð tímað væl at gera hár og at orðna neglir, so Monroe var

akkurát nakað fyri meg, hugsaði eg. Og tað var tað eisini.

Tá ið vit komu um morgunin, fóru vit at gera kaffi og te klárt, pussaðu speglini, støvaðu av og kjekkaðu, um alt var í ordan. Tá ið kundarnir komu, tóku vit jakkan frá teimum og bjóðaðu teimum kaffi ella lakresste.
Vit sluppu at gera tað mesta. Vit góvu konum hondmassagu, litaðu einari gentu við hárið niður á rumpuna, og sum var ordiliga krúllut. Tað var ein ordans uppgáva, men stuttligt allíkavæl, og tað gekk væl. Vit vaskaðu hár og masseraðu hárbotnin á fólkið.
Man brúkar nógv handkløð, tá man er frisør, og um nógv handkløð vóru skitin ella vát, so vaskaðu vit tey, løgdu tey saman, og so út aftur í salongina.
Um vit ikki høvdu nakað at gera, kundu vit gera hvørja aðra. Ein dagin krúllaðu vit hvørjari aðrari, og ein annan dag gjørdi vit neglirnar hjá hvørjari aðrari. Tað var stuttligt.

Eg slapp at strípa mammu míni, og tær søgdu, at eg kundi blíva ein góð frisør í framtíðini, og at eg hevði gott handalag. Man blívur glaður av at hoyra tað, og tá fekk eg meira hug til at gerast frisør.

Tá ið dagurin næstan var av, tømdu vit kannurnar, moppaðu gólvið, pussaðu speglini og syrgdu fyri, at alt var klárt til dagin eftir.

**Kvinnukvøld í Eydnuni**
Mánadagin, tá ið vit høvdu verið í starvs-venjing í eina viku, var eitt kvinnukvøld har norðuri. Vit sluppu at vera við til tað, og tað var ordiliga spennandi. Monroe skuldi skipa fyri einari mótasýning við brúðar- kjólum frá 1940'unum og upp til 2010.
Vit høvdu tíggju modellir, sum skuldu hava brúðarhár, fáa make-up og latast í brúðar-kjóla. Tað var ein strævin, men stuttligur dagur.
Eg streyk eitt slør, sum var einar fimm metrar langt. Men tá ið modellin skuldi ganga mótaframsýning, var sløríð akkurát líka rukkut, sum tað var áðrenn. So tað arbeiðið var til onga nyttu.

Vit krúllaðu einari modell og einari lítlari gentu, sum skuldi vera "brúðargenta".

Áðrenn kvøldið byrjaði, hjálptu vit til við at pynta húsið. Tað bleiv ordiliga flott.

Tá ið allar modellirnar vóru komnar hartil, sminkaðu make-up artistarnir teimum, so vóru tær klárar at ganga modell í brúðarkjólum.

Í pausuni fingu allar kvinnurnar eitt stykki av lagkøku frá Miðberg Bakarí (babba), og síðan gekk leiðin heim.
Ein sera spennandi og væleydnaður dagur var at enda komin.

**Hug at gerast frisør**
Eftir tvær vikur í starvsvenjing í Monroe, fekk eg hug at gerast frisør. Eg fekk ótrúliga nógv burturúr og lærdi nógv um, hvussu man skal verða ein væl dámd frisør.

Konurnar, sum arbeiða har, eru fittastu og blíðastu frisørar, eg veit um.

So hevur tú havt ein dreym um at gerast frisør, ella make-up artist, ella hvat tað nú skal vera, og vilt tú uppfríska hugin til tað, so haldi eg avgjørt, at vælverustovan Monroe er eitt pláss til tín at fara í starvsvenjing.

Eg kundi væl hugsað mær at verið har í minsta lagið tvær vikur afturat, og kann bara siga gott um tað.

Og nú hopi eg, at eg havi givið tykkum í 8. flokki (kanska mest gentunum) inspiratión til at fara í praktikk í Monroe við Norðskála. ☺

*P.s.: Tær klippa, lita, strípa ella hvat tú vilt gera við títt hár fyri onki. So at tað er eisini eitt plus+ ☺*

*Matilda vaskar hár*



*Lekkurt gosbað*







*Elisabeth Maria Danielsen. Øll produktir, sum tey brúka og selja har, eru økologisk: hárspray, shampoo og sjálvt litingin.*

# Djór doyggja

*Djóralæknar síggja djór doyggja hvønn dag. Nøkur av sjúku ella skaða, onnur tí tey skulu avlívast. Helst eru fleiri sum av hesi grund ikki høvdu valt djóralæknastarvið. Men djóralæknastarvið er meira enn bara sorg og deyði.*



BARBARA NYGAARD

Barbara-nygaard@hotmail.com

Tvær tær fyrstu vikurnar í mars 2010 var eg í praktikk hjá tveimum djóralæknum í Danmark. Fyrstu vikuna var eg hjá “Dyrelægegruppen Laugø”, har tey fyri tað mesta viðgera størri djór, til dømis hestar, kýr, seyðir og grísar. Fýra djóralæknar vóru til arbeiðis umframt, at trý onnur starvsfólk svaraðu telefonunum og ansaðu einari ryssu, sum hevði eitt fyl í búkinum.

Dagarnir byrjaðu við kaffi og kakao til klokkan bleiv 9.00, og so fóru vit út í bilarnar og koyrdu runt til allar møguligar garðar og kannaðu djórini. Klavs Alexander, sum átti klinikkina, hevði ein stóran labrador (hund) við sær hvørja ferð, hann fór avstað. Tað var hugnaligt, tí so sat eg saman við hundinum, tá vit koyrdu avstað.




**Hundurin hjá djóralæknanum sat framman!**

Nógv var at hyggja at, og hóast tað var kalt at standa still og fylgja við, so bilaði tað einki, tí alt var so spennandi. Eg fekk loyvi at koyra við øllum djóralæknunum, og soleiðis kom eg at kenna tey øll ógvuliga væl. Tey vóru øll ordiliga fitt og blíð.

Ein tann besti dagurin var, tá ið vit fóru út á ein gamlan garð og sóu ein hest, sum hevði skrætt annað eygað sundur. Eg helt, at tað var spennandi at síggja, hvussu djóralæknin viðgjørdi skaðan. Sjálv helt eg, at tað sá ógvuliga ringt út, men djóralæknin kláraði sjálvandi at viðgera eygað so væl, at man ikki sá, at tað nakrantíð hevði verið skrætt. Sjálvandi var eygað hovnað, men annars var tað ordiliga pent.




**Hestur við skaða í pannuni**

Seinasta dagin hevði eg kaku við, og Klavs segði, at eg altíð kundi koma aftur at vitja og hjálpa, um eg hevði hug. Eg ivist ikki í, at eg fari at taka av, tí eg hevði eina so góða viku saman við teimum og upplivdi so nógv.

**Vika 2**

Næstu vikuna var eg í starvsvenjing í Hillerød hjá einari djóralæknatænastu, sum eitur "Slotsbyens Dyreklinik". Fýra djóralæknar arbeiða har, men tilsamans eru átta ella nýggju fólk á klinikkini, tá vit telja djóra-sjúkrasystrarnar við. Her viðgjørdu tey einans smá djór so sum kettur, hundar og kaninir. Operatiónir vórðu framdar, og tær vanligastu vóru, tá hundar og kettur blivu geld. Tey høvdu eisini ein lítlan handil við djóramati, hálsbondum og øðrum.

Ein tann besti dagurin var, tá vit skuldu operera 5 kettur samstundis, og eg varð biðin

um at passa øll djórini, sum vóru komin inn á klinikkina. Eg skuldi geva teimum at eta og reinsa búrið, har hundarnir og ketturnar høvdu sitið. Tað var so stuttligt at passa djórini, tí tey vóru so fitt, og eg gekk bara runt og snakkaði við tey. Men tað ringasta var, at man hevði hug til at taka øll djórini við sær heim.

Eg fór í praktikk hjá djóralæknunum, tí eg hevði hug til at uppliva okkurt spennandi. Nú eg hevði kjansin, og tað gjørdi eg. Men eg fór sjálvandi eisini, tí eg elski djór, og tí eg haldi, tey eru fitt at vera saman við. Mær dámdi sera væl, og um eg skuldi í starvsvenjing aftur, hevði eg heilt víst farið aftur sama stað.

Sjálvandi er tað hart at síggja djór doyggja ella verða tikin av døgum hvønn dag, men tað er nakað, tú venur teg við. Eg helt eisini, at tað var synd, at djórini skuldu liva, tá eg sá, hvussu sjúk tey vóru.

Hevði eg vilja verði djóralækni? Ja, tað hevði verið spennandi!

# Eitt starv við spenningi

*Fyri stutt síðani var eg í starvsvenjing hjá SEV. Tað vóru tvær sera spennandi vikur, og har var nógv at læra.*

BJARTI KRISTIANSEN

**Hvat er SEV?**

SEV er eitt og einasta elfelagið í Føroyum. Elfelagið SEV veitir okkum í Føroyum ravmagn. SEV er interkommunalur felagsskapur, sum allar kommunur í Føroyum eiga, og sum harvið allir føroyingar eiga. SEV hevur eina veitingarskyldu, sum áleggur felagnum at veita øllum borgarum, virkjum, stovnum o.s.fr. streym alt samdøgrið. Av tí at Føroyar er eitt avbyrgt oyggjasamfelag, fáa vit ikki keypt streym frá øðrum londum, tí skal SEV veita orku til alt landið hvønn dag alt.

SEV er eitt interkommunalt felag, og tí skal tað vera rættvíst fyri øll. Tí hava tey eina nevnd, sum 7 limir eru í, ein úr hvørjum av hesum økjum: Norðoyggjum, Eysturoy, Sundalagnum/Norðstreymoy, Vágum,

Suðurstreymoy, Sandoy og Suðuroy. Hvørt øki velur sær ein lim, og hann skal so umboða økið hann er frá.

SEV er eitt sera stórt og víðfevnt arbeiðspláss. Tað eru nógv ymisk fólk við nógvum ymiskum arbeiðum og nógvum ymiskum fólkum. Har arbeiða kontórfólk, elektrikarar, maskinmenn og nógv onnur, ið eru útlærd innan fyri okkurt annað økið. Arbeiðið hjá SEV verður sett í bólkar, har hvør bólkur fær sína uppgávu, har arbeiðsbólkurin verður samansettur til hvørja uppgávu sær.

**Hví eg valdi sev SEV?**

Streymur er júst nakað fyri meg, og SEV er tað einasta elverkið í Føroyum. Einki annað arbeiðspláss í Føroyum hevur tað at bjóða, sum SEV hevur innan fyri streym.

**Nógvar ymsar uppgávur**

Eg var har í tvær vikur og gjørdi nógv ymiskt. Eg fekk eitt skema at ganga eftir, so eg skifti ímillum fleiri arbeiðspláss. Eg arbeiddi við nógvum ymiskum so sum transformarum, tók háspenningslinjur niður, gróv háspennings - káplar upp og niður. Eg umvældi eisini stempulsylindarar. Eg arbeiddi eisini við lágspenningskassum, tað var sera avbjóðandi. Fyri at arbeiða við teimum, má ein hugsa sera langt, og væl tað er eitt sera stressandi arbeiði. Tað snýr seg um at finna útav, hvørjar transformarar kassarnir eru forbundnir til. Av tí at alt er grivið niður, máttu vit hyggja inn í nógvar kassar, sum stóðu har umkring.

**Sundsverkið**

Tann eina dagin var eg á sundsverkinum. Tað er har, 60% av allari elorku í Føroyum kemur frá. Vit sløktu ein av teimum 6 motorunum, ið



vóru har, tí at hann skuldi umvælast. Eg og ein annar maður fingu uppgávuna at umvæla stemplið og celyndaran. Allir deilirnir vóru skitnir, so vit vaskaðu og trykkspulaðu teir. Nú var klárt at fara til verka. Vit skrúvaðu stemplið sundur, settu nýggjan stempulring í og gjørdu tað síðan púra tætt. Celyndarin slípaðu og pussaðu vit bara.

**Hvussu mær dámdi har?**

Mær dámdi sera væl á SEV. Har slapp eg at prøva nógv ymiskt, tað var ongantíð keðiligt. Eg haldi heilt vist, at tað var tað vert at fara til SEV. Eg hevði tað sera stuttligt, men tað var eisini sera læruríkt.

# Elektron - alt annað enn pappírleyst

*Á Elektron er tað bara stravið arbeiði, sjálvt um næstan alt er við teldu. Men har er eisini ein Harrans rúgva av pappíri... men tað er stuttligt at vera har, tey hava humor!*

ADRIAN ELLINGSGAARD

Eg havi verið í starvsvenjing á Elektron, sum heldur til í Tórshavn.

P/F Elektron varð stovnað í 1965 av peningastovnunum og Tryggingar-sambandinum við tí endamálið at veita eigarunum elektroniskar bókhaldstænastur. Elektron var sostatt ein av fyrstu KT fyritøkunum í norðurlondum.

Elektron er ein fyritøka, sum bleiv sett á stovn fyri at taka sær teimum elektronisku viðurskiftunum hjá peningastovnunum og tí almenna. Í 1987 bleiv skattaskipanin gjørd elektronisk, og í tí sambandi bleiv Føroya Landsstýri ein av eigaranum av Elektron.

Eingin eigur sum so Elektron, men har er ein stjóri við navninum Niels Christian Nolsøe, annars eiga Føroyar Elektron. Har arbeiða nokkso nógv fólk á Elektron - umleið 90. Á Elektron arbeiða tey við finansinum hjá bankunum, mest hjá Føroya Banka. Í 1979/1980 blivu allar bankadeildir online. Tey senda eisini brøv fyri Taks, Als, Suðuroyar Sparikassa, Norðoya Sparikassa, Eik, Føroya Banka, og senda brøv aftur, sum ikki eru blivin goldin.




Eg fór í praktikk hjá Elektron, tí at eg havi áhuga fyri teldum og elektroniskum tingum. Ert tú praktikantur einsamallur, so hevur tú eitt tungt arbeiði við nógvari rudding og slavuarbeiði. Tann fyrsta dagin, eg var har, stovnaði eg eini 120 kundar inn í systemið og slapp heim klokkan 12.30. Næsta dagin var eg á hospitalinum og repareraði ein servera hjá kommunulæknunum. Tað gekk ikki so væl, inntil hann snýtti :D. Eg haldi tað var stuttligt at vera har, man lærir at sortera øgiliga væl...

Tú lærir, at tað er hart arbeiði aftan fyri eitt so einkult ting sum bara at senda brøv út. Har er stuttligt at vera, og tú lærir mangt, tú ikki lærir aðrastaðni. Men tú skalt eisini vera opin psykist, fyri at læra nakað.

Alt í alt eri eg sera vælnøgdur við tíðina á Elektron.

# Tá lívið er upp á spæl

*Tann 1.-12. mars var eg í starvsvenjing á einum sera umráðandi plássi fyri landið. Eg valdi mær sjúkrahúsið, ein sera stórur bygningur, har yvir 700 fólk vilja hjálpa øðrum. Tey hjálpa sjálvandi ikki hvørjum sum helst, tey hjálpa teimum sjúku. Hvønn dag seta tey sítt lív uppá spæl fyri at hjálpa. Er tað virkuliga nakað eg vil arbeiða við?*

DANIA S POULSEN

**Hví sjúkrahúsið**

Tann 1.- 12. mars var eg í starvsvenjing á sjúkrahúsinum. Eg valdi at fara í starvsvenjing har, tí at eg ikki hevði nakra hóming av, hvat eg vildi blíva í framtíðini. Tíðin nærkaðist, har man skuldi velja, hvat man vildi blíva, man visti ikki, um man skuldi taka student, 10. flokk ella okkurt heilt annað. Eg tonkti nógv yvir, hvat eg skuldi vera, og kom so í tankar um alt møguligt. Men eg bleiv so nokkso sikkur í einum, og tað var at eg vildi hjálpa øðrum. Tað tíðina sá eg nógv *Greys hvide verden,* sum er ein seria um læknar og teirra persónliga lív.

Har sær man millum annað, hvussu stressað tey eru, og hvussu kedd tey blíva, tá ið alt ikki gongur eftir vild. Men eg minnist væl úr einum brotið, har ein eldri lækni vísti einum ungum og stressaðum lækna, hví tey gjørdu tað, tey gjørdu. Har sá man tey smílandi andlitini, har tey høvdu bjarga einum lívið - gleðina av at hjálpa øðrum. Eg setti mær so eina ætlan um at blíva ein, sum hjálpir fólkið. Mín fyrsti tanki var sjúkrahúsið. Eg fann so telefonnummarið hjá Landssjúkrahúsinum og ringdi. Eg havi sjálv ongantíð verið ein sjúklingur og havi harvið ikki oftani upplivað at verið á sjúkrahúsinum. Eg helt, at tað var eitt sindur merkiligt at seta sær tað sum mál at arbeiða á einum sjúkrahúsið uttan at vita, hvat á sjúkrahúsinum man vildi blíva og yvirhøvur, hvussu tað er at arbeiða á sjúkrahúsinum.

**Hvat sleppur man tá ið man er í starvsvenjing**

Á sjúkrahúsinum upplivdi eg nógv áhugavert og mennandi. Tey flestu vildu nokk hildið, at á sjúkrahúsinum fór man bara at reiða sengur upp og vaska. Men tað gjørdi eg sera lítið av. Tey gjørdu meira fyri at gera meg klókari uppá, hvat tað er at arbeiða á sjúkrahúsinum. Eg slapp sjálv at velja, hvar eg vildu vera á sjúkrahúsinum. Eg fekk eitt pappír við nógvum ymiskum deildum á, og eg slapp at velja sjey av teimum. Ongin dagur var líka, tí at eg var næstan ongantíð á tí sama staðnum ella saman við teimum somu fólkunum. Tað var alt ann uppá, hvar man var, og hvussu blíð fólkini vóru. Eg slapp at anda í eina masku, sum sjúklingar ofta fáa, tað er 100% reint oxygen. Eg slapp eisini at síggja, meðan konur, sum vóru uppá vegin, fóru í skann-aran. Eg koyrdi sjúklingar runt frá deild til deild saman við portørunum. Har var eisini nógv annað mennandi, sum eg slapp at vera við til.

**Á laboratoriunum**

Tann næstseinasta dagin í starvsvenjingini var eg á laboratoriunum. Har var tað, at øll sendu prøvar til, so at tey, sum arbeiddu har kannaðu tað, og tað vóru nógvir blóðprøvar. Tað eru so ógvuliga nógv, sum lata seg kanna seg fyri ta kendu sjúkuna CDT. Millum annað koma blóðdonorar eisini har. Tá sá eg eisini, hvussu umráðandi tað er, at fólk vilja lata blóð. Um onkur nú manglar orduliga nógv blóð knappliga, so er tað ógvuliga umráðandi at hava blóðdonorar. Eg slapp sjálv at kanna hvat fyri blóðtýpa, eg eri, sum var sera áhugavert.

Allir dagarnir vóru ikki eins, man bleiv fluttur frá stað til stað, og summar tíðir var tað sera mennandi, har man lærdi nógv, og aðrir dagar, har man ikki kundi vera so nógv við til alt. Man sá nógv til, hvussu tey arbeiða á einum sjúkrahúsið.

**Hvør annar arbeiðir har?**

Har eru øll sløg av arbeiðarum á sjúkrahúsinum. Har eru nógv fólk, sum arbeiða í køkinum, har tey mugu gera mat til øll fólkini á sjúkrahúsinum. Á sjúkrahúsinum er eisini eitt vaskarí, har tey vaska øll klæðini, og har eru maskinur, sum menn so arbeiða við. Men tey, sum síggjast mest á sjúkrahúsinum, eru tey, sum hava við sjúklingarnar at gera: læknarnir og sjúkrasystrarnar. Og tá ið eg valdi mær sjúkrahúsið, var tað sjálvandi tí at mín áhugi var at blíva sjúkrasystir ella okkurt tílíkt, sum hevði við sjúklingar at gera.

**Alt í alt**

Í alt var tað sera áhugavert, og mær dámdi væl at vera í praktikk á Landssjúkrahúsinum. Onkuntíð hevði man sera lítið at gera, tá ið hini arbeiddu, og man ikki hevði nakað, sum man kundi gera. Men fólkini, sum eg var saman við, royndu orduliga at læra meg nógv, og tað var sera áhugavert. Tað er alt annað uppá hvar man ferð, og hvar man sleppur at hjálpa nógv til.

# MEST á Skála

*At vera í praktikk hjá Mest á Skála er sera áhugavert hjá næmingum, sum t.d. vilja læra til maskinsmið. Arbeiðsplássið har er eitt verkstað, sum hevur gjørt nógv skip, og teir fáa eisini skip inn á Skála, sum teir so skulu arbeiða uppá. Teir fáa nógv arbeiði, tá ið skip eru har, tí nógv skal skiftast ella bara repererast. Teir arbeiða upp á alt innanfyri maskinarbeiði, bedings- og stálarbeiði.*

ODD ANDREASSEN

Fólkið har í dag er ikki nógv. Har eru formenninir Kári Weihe, Jóhan Medardus Jacobsen (Dardus), Eivin Olsen og MEST leiðarin Mouritz Mohr. Har arbeiða eisini lærlingar og nýútlærdir maskinsmiðir. Og so eru eisini nakrir heilt fáir menn afturat. Menninir, sum arbeiða hjá MEST, eru allir øgiliga fittir.

Men grundin til, at eg fór har, er, at eg vil sleppa at læra til maskinsmið, og tí vildi eg

sleppa at fara í praktikk har fyri at finna útav, hvussu tað fer at vera, tá ið eg vónandi farið at læra har ein dag.

Í fyrstani, tá ið vit fingu praktikkbløðini, visti eg als ikki, hvat eg skuldi velja. Men eg legði dent á, at eg vildi sleppa á Skipasmiðjuna á Skála at læra, so hví ikki bara byrja við at fara í praktikk har? Og tað eydnaðist so at fáa praktikkpláss har.

Tá ið eg byrjaði, slapp eg ikki at gera so nógv, men so uml. 3. dagin eg var har, slapp eg at gera mong ting. Sum til dømis, at vinkulslípa, fresa, sveisa, koyra við trukki og mong onnur ting.

Tann fyrsta dagin eg var í praktikk í MEST á Skála, bleiv eg sendur til Eivin Olsen, sum er formaður í bedingini. Hann er ein heilt einastandandi fittur maður. Tað, sum eg skuldi gera saman við honum, var, at eg skuldi hjálpa til at stilla "Enniberg", sum er ein trolari, inn í dokkina. Vit skuldu stilla Enniberg púra beint aftur og fram, síðu til síðu, ella í øðrum orðum, vinkulrættan. Og har var mítt arbeiði at standa við eitt spæl, sum hálaði skipið til mín. Tað dámdi mær øgiliga væl at arbeiða við. Eisini skuldu vit stilla træpinnar upp í móti Enniberg, so at skipið ikki flutti seg ein metur. Mínir arbeiðsfelagar vóru 3 tann dagin. Har eru bara 3 menn í bedingini, har Eivin er tann eini, Hallur tann eini og so Poul.

Aftaná at vit vóru lidnir at stilla Enniberg, tendraði Eivin pumpurnar, sum pumpa vatnið úr dokkini, so at vit kundu fara niður at arbeiða undir skipinum. Tað var ordiliga spennandi. Men ímeðan pumpurnar pumpaðu, vildi Eivin so øgiliga gjarna vísa mær alt, sum teir gjørdu á bedingini. Tað, sum hann vísti mær, var spennandi at síggja. Har var millum annað nýggj ting, sum teir brúka í dag til at arbeiða við, spøl, sum vóru "underground". Aftaná hann hevði víst mær alt, fór eg síðani niður í dokkina at krøkja trukkar, lyftir og koyrilyftir leysar. Tað var spennandi. Tað besta tann dagin var at sleppa at koyra trukk og vera niðri í dokkini, tað var øgiliga stuttligt. Hatta var tað, sum eg gjørdi mest av tann fyrsta dagin.

Mín meining um at vera í praktikk í Mest á Skála er, at har er kanska ikki nógv at gera, tá ið eingin skip eru, men tað er annars eitt gott stað at læra. Eg var har bara í 2 vikur og dugdi einki av hesum, sum vit gjørdu. Men eg lærdi kortini okkurt, og eg eri glaður fyri tað, og tað eru øgiliga góð ting at læra har, vissi man ætlar sær at læra til maskinsmið.

T ið eg byrjaði í praktikkini, dugdi eg slett ikki at vinkulslípa, fresa, og at sveisa - tey tingini sum eg vildi gera. Aftaná eg hevði prøvað nakrir ferðir, fekk eg rós fyri mítt arbeiði. Men MEST á Skála haldi eg er eitt øgiliga gott og áhugavert stað at fara at læra í og fara í praktikk í. Eg haldi, at einhvør, sum ætlar sær at vera maskinsmiður ella maskinmeistari longu nú, skal fara har, tí at hatta er eitt gott stað at læra í.



# BBR Service

*BBR er nokk ein av landsins nýggjastu og mest modernaðu bilverkstøðum. Av og á taka teir praktikkantar úr fólkaskúlanum, og eg var ein av teimum hepnu.*

PÆTUR O. BERG

**Praktikk í BBR**

Í gamla grótbrotinum á Lambareiði liggur nýggi stásiligi bilverkstaðurin BBR Service, sum nokk er ein av mest modernaðu bilverkstøðum í landinum. Á verkstaðnum eru seks menn til arbeiðis, harav tveir lærlingar, annar á fyrsta ári, og hin á øðrum ári.

Á verkstaðnum BBR arbeiða teir mest við tí mekaniska. Teir arbeiða ikki við plátum og lakkeringum, annars hava teir møguleikar til næstan alt annað. Tað verður gingið høgt upp í, at arbeiði verður gjørt ordiliga.

BBR útleigar bilar, mest til kundar, sum hava koyrt sínar bilar til reparatión. BBR selur eisini bilar fyri kundar. Á nýggja bilverkstaðnum hava teir eisini eitt framsýningarrúm, sum teir fáa einar tveir - tríggjar bilar inn í. Teir hava eisini gott pláss uttanfyri.

Teir hava fyri nøkrum fáum árum síðani flutt úr einum lítlum bilverkstaði til nýggja bilverkstaðin á Lambareiði. Umstøðurnar eru góðar á Lambareiði. Har hava teir møguleika til alt møguligt, sum teir ikki høvdu áðrenn.

Fríggjadag verður vaskað. Teir gevast ein tíma fyrr og fara so at skrubba alt flísalagda gólvið. Eftir hetta er verkstaðurin sum nýggjur.

Bogi Rasmussen er stjóri á verkstaðnum. Hann eigur verkstaðin saman við beiggja sínum, Rógva, og svági sínum, Birgir.

**Áhugin tann sami**

Eg havi altíð havt stóran áhuga í bilum, tí helt eg, at tað hevði verið stuttligt at farið í praktikk á einum bilverkstaði og sæð, hvussu tað gekk fyri seg. Eftir at hava verið í praktikk í tvær vikur í BBR er áhugin fyri bilum og fyri bilverstøðum ikki minkaður - um nakað so heldur hin veg.

Teir tóku allir væl ímóti mær og vóru ógvuliga vinarligir, tá ið eg kom har tann fyrsta dagin, og teir vóru líka blíðir restina av praktikk-tíðini.

Arbeiðsdagurin hjá teimum er frá klokkan átta til fýra.

Tann eina dagin skuldi ein av lærlingunum til Kambsdals eftir dekkum, og eg var so biðin at fara við honum. Tá ið vit komu aftur av Kambsdali, hjálpti eg honum við at skifta og balansera dekkini. Klokkan tíggju fóru vit til kaffi. Aftaná kaffi skuldi eg hjálpa hinum lærlinginum við at polera og bona ein av leigubilunum hjá BBR. Klokkan 12.20 var døgurði. Aftan á døgurðan hjálpti eg einum av bilmekanikarunum við at avmontera motorin í einum bili, sum skuldi skifta motor, tí hann var gingin fyri. Aftaná hjálpti eg sama persóni at skifta ein forrút. Klokkan fýra var arbeiðsdagurin liðugur.

Áðrenn eg fór í praktikk hjá BBR, væntaði eg ikki, at tað var so nógv hjá einum praktikkanti at gera á einum bilverkstaði, men eg slapp framat í ymiskum. Mær dámdi væl at vera í praktikk hjá BBR. Eg slapp at royna sumt, sum eg ikki hevði roynt áður, og eg sá, hvussu arbeiðsdagurin hjá einum bilmekanikara er.

# Praktikk í frítíðarskúlanum í Rituvík

*At vera pedagog, ljóðaði sum nakað sera óinteressant og turrislig í mínum oyrum fyri einum mánað síðani. Og nú virkar tað sum nakað sera spennandi og læruríkt arbeiði, nú tá ið eg sjálv havi roynt meg sum ein pedagogur. Hugurin til at vera pedagog hjá mær er sera stórur nú.*

Rut Jacobsen



Grundin til, at eg valdi at fara í praktikk í frítíðarskúlanum í Rituvík, er, tí at mær dámar sera væl at passa børn. Hví eg akkurát valdi hatta staðið, ja, tað veit eg nú ikki. Men eg eri sera glað fyri, at eg endaði har, tí arbeiðsfólkini vóru sera blíð, og tað var ikki ringt at sleppa upp í part at tosað og roksa saman við teimum.

Í stovuni, har eg arbeiddi, vóru seks arbeiðsfólk tilsamans, men øll vóru ikki til arbeiðis somu tíð. Har vóru fýra kvinnur, og tveir ungir menn. Aftrat okkara stovu, har 27 børn vóru á, vóru eisini tvær aðrar stovur til barnagarðsbørn. Har vóru eisini seks arbeiðsfólk á hvørjari stovu, men bert 20 børn á hvørjari stovu.

Tað, sum eg gjørdi tær báðar vikurnar, eg arbeiddi í Rituvík, var at ganga túrar við børnunum, og spæla úti í sandinum við teimum. Summar dagar slapp eg at baka bollar og gera køkur til millummála, og tað dámdi teimum sera væl. Eg bara tók tað stilt og róligt og spældi spøl saman við teinum og teknaði myndir og málaði saman við teimum.

Ein dagin, ímeðan eg var har, slapp eg at spæla stjóri. Tað var sera spennandi. Um okkurt barn var eitt sindur ov kúllasligt, so var tað bara ein veg, og tað var oman á kontórið til mín og Jørgen (tann orginali stjórin). Men tíverri tóku børnini meg alt ov óseriøst. Men tað var spennandi at sleppa at royna meg sum stjóri.

Mær dámdi sera væl í Rituvík hasar tvær vikurnar, og eg helt at tað var fantastiska stuttligt. Men tað vánaligasta var, at tíðin gekk alt ov skjótt.

Og um onkur at tykkum í 8. flokki ivast í, hvar tit skulu fara í praktikk í 9'inda flokki, ja, so vil eg ráða tær til at fara í frítíðarskúlan í Rituvík.



# Rit&Rák

*Tað ljóðar kanska keðiligt fyri onkran, men eg má líka siga, at starvsfólkini, ið eg arbeiddi saman við, gjørdu alt tvífalt so stuttligt. Tey virkaðu so frísk og ungdómslig. Onkutíð var eg um at missa blokkarnir á gólv, sum eg flenti!*

ANNIKA SIMONSEN

Rit&Rák er ein bókahandil í SMS. Har ein stjóri, ið eitur Kári Árting. Hann heldur stýr á øllum og skal syrgja fyri, at handilin gongur, sum hann skal. So eru tað 4-6 onnur, ið bíleggja bøkur, seta vørur uppá hillar, standa við kassan og leiðbeiningina og sita á kontórinum. Tey møta øll klokkan 10 og fáa so frí ímillum klokkan 16-18.

Grundin til, at eg valdi at fara í starvsvenjing hjá Rit&Rák, var, at Sosialurin tekur ikki praktikantar, og tað var ikki pláss á Dimmu. So eg setti meg og skrivaði niður øll tey áhugaverdu arbeiðsplássini, ið eg kundi koma í tankar um. So ringdi eg til ymisk arbeiðs-pláss, og Rit&Rák vóru tey fyrstu, ið játtaðu.

**Ein vanligur dagur í praktikk**

Eg kom ikki í praktikk í tí bestu tíðini. Fyrst í mars hevur Rit&Rák ikki so nógv at gera, men tað gjørdi einki. Eg slapp at gera eina rúgvu av ymiskum tingum allíkavæl.

Ein vanligur dagur hjá mær var, at eg møtti klokkan 10. Byrjaði dagin við at fylla ringbind og blokkar á hillarnar. Síðani kundi eg t.d. pakka nýggja vøru upp, setta prísir á konfirmatiónskort og vegleiða fólki inntil klokkan 12. Tá fór eg í døgurðasteðg í ein hálvan tíma.

Tá eg kom aftur, setti eg fleiri prísir á kort, bamsur og kontórgreiðir, og endaði við at standa við kassan í 2-3 tímar.

Eg fekk frí klokkan 16, men sum oftast valdi eg at hanga út í SMS í ein hálvan tíma saman við vinunum, áðrenn eg fór heim.

**Stuttlig starvsfólk**

Fyri onkran ljóðar tað kanska keðiligt, men eg má líka siga at starvsfólkini, ið eg arbeiddi saman við, gjørdu alt tvífalt stuttligari. Tey virkaðu so ungdómslig og frísk. Onkutíð var eg um at missa blokkarnir á gólv, sum eg flenti!

Tey vóru ordiliga við upp á nógv. Vit skutu elastikk eftir øðrum starvsfólkum, keyptu ís, tá vit einki høvdu at gera, sótu og tosaðu og flentu at undarligum tingum.

Sjálvandi, so vóru tey ikki altíð so óseriøs, men tað var altíð líka hugnaligt at vera har.

**Hevði ikki stórar væntanirnar**

Mær dámdi sera væl at vera har. Eg vantaði ikki nógv. Tað fyrsta, eg hugsaði, tá eg søkti um starvsvenjing, var, at eg vildi aldri í lívinum arbeiða í einum handli. Tað hevur aldri verið nakað fyri meg.

Men tá tað ikki gekk so væl við at finna pláss, so valdi eg Rit&Rák. Og eg hevði aldri gitt, at tað hevði verið so spennandi! Har vóru so nógv góð ting at gera har, og eg lærdi super nógv!

Tað stuttligasta var at standa við kassan, tí tað var avbjóðandi, men samstundis var tað sera hugnaligt. Fólk vóru altíð líka blíð, og

gjørdi eg ein feil, so vóru tey ótrúliga tolin.

At seta prísir á var eisini ordiliga skeg. Tólið, man nýtir at seta prísir á við, er ein klassikari! Onkrar dagar setti eg prísir á yvir 1000 kort út í eitt. Tá fekk eg gott nokk ilt í hondina, men tað føldist gott at hava gjørt okkurt til nyttu.

Og sum eg havi sagt, so vóru starvsfólkini ordiliga fitt. 6 stjørnur til tey!

**Rit&Rák, ikki mítt framtíðarstarv**
Sjálvt um eg hevði tað mega stuttligt, og tað føldist sera gott at arbeiða har, so er bókahandil ikki mítt framtíðarstarv. Og tað er eisini púra okey! Tí nú havi eg roynt tað, og so veit eg í hvussu so er, at tað er ikki nakað, sum eg fari at gera seinni í lívinum. Men eg havi langt frá spilt tíðina.

Persónliga so haldi eg, at tað er nógv kulari at velja eitt meira "vanligt" praktikkpláss. Tí so sleppur tú at gera ordiliga nógv.
Um tú til dømis hevði valt at fara í praktikk hjá einum sakførara ella politisti, so hevði tú óivað ikki sloppið at arbeitt sum ein ordiligur sakførari ella politistur. Men velur tú ein handil, so upplivir tú arbeiðslívið meira veruliga. Tú sleppur at gera tað sum ein útlærdur handilsmaður sleppur at gera.

Og tað ger upplivilsið nógv feitari!

# Simme musikhús

*Eg havi verið í praktikk í Simme musikhús. Simme musikhús er áhugavert innan musikk, tú fært alt, sum ber til at spæla uppá, har.*

ÁRON Á ROYKHEYGGI

Simme musikhús er ein handil, ein tónleika-handil. Tað vil siga, at teir selja nógv instrumentir, millum annað: Guitarar, trummur, bassar, klaver og mangt og hvat. Tú finnur alt, sum tú skalt brúka har innan fyri tónleik.

Tað er bara ein eigari av Simme musikhús, og hann eitur Magnus Bjarnastein. Hann er ein ógvuliga fittur maður, og hann er úr Runavík. Har eru tveir menn, sum arbeiða har. Hin spælir í einum tónleikabólki, ið eitur: Onion tree.

Teir arbeiða við tónleiki og reparera nógv instrumentir og mangt annað. Í handlinum er ikki so lítið at gera. Tú sleppur at gera alt møguligt: at skifta streingir á guitarum/bassum, pussa guitarar/bassar, prísa, bera vøru og mangt annað.



Eigarin ger sjálvur guitarar - ikki í Simme musikhús, men heima hjá sær sjálvum. Tað koma nógvir tónleikarar bæði kendir tónleikarar og komandi tónleikarar inn í handilin, so teir selja eitt sindur.

Eg fór har, tí mær dámar væl tónleik sjálvur. Eg spæli guitar og eigi tveir guitarar, sum eru har frá, so tað var áhugavert hjá mær at fáa meir at vita um hesi ting. Í handlinum eru nógvir guitarar, so eg hevði nógv at hyggja at. Eg havi ofta verið inni har, og mær dámar væl at vera har. Tað er tí, eg fór til Simme musikhús.

Eg gjørdi eisini nógv har, og tað er áhugavert at vera har. Eg slapp bæði at stemma guitarar og bassar, pussa guitarar og bassar, prísa vøruna, ið kom, og at bera vøruna, ið kom, upp á pláss. So tað er ikki so lætt, sum øll halda.

Ein dag tá eg var har, var nógv at gera.  Nógv vøra var komin heim, og tað píndi í rygginum aftaná, at eg hevði borið alla vøruna. So skuldi vørðan prísast og fáast uppá pláss, har sum hon hoyrdi heima. Tað var mega nógv. So skuldi vørðan tastast inn á telduna, so at alt stemmaði. Men aftaná føldi eg, at eg hevði gjørt okkurt.

Teir, sum arbeiða har, eru super fittir, blíðir og fyrikomandi. Teir taka væl ímóti tær, og tú sleppur at gera okkurt. Teir bjóðar tær eisini kaffimunn og mangt annað, og tú lærir nakað av teimum. Tað er eisini mega fínt har og nógv fín ting, sum tú sleppur at nerta við. Alt í alt er tað er mega interessant at vera í praktikk í Simme musikhús.

# Sjólívið er sakin

*Sjólívið er sakin. Tað er sera læruríkt. Man lærir alt frá at hála trolið inn til at pilka innvøl.*

FINN DAM PETERSEN.

Praktikkplássið, sum eg var í, er ein partrolari, sum eitur Stjørnan. Hitt skipið, eitur Polarhav. Reiðari er Tummas Justinussen. Á hvørjum skipi er manningin: ein skipari, ein stýri-maður, ein maskinmeistari, ein kokkur og tríggjar dekkarar. Teir trola eftir upsa, og viðhvørt kemur okkurt annað fiskaslag í trolið, sum t.d. toskur, hýsa, havtaska og annað. Umborð er ein kryvingarmaskina, sum ger, at arbeiðið gongur skjótari, men man skal eisini kryvja og pilka (taka innvøl úr fiski). Eisini skal arbeiðast í lastini, har kør skulu flytast, trolið hálast inn og koyrast út. Umborð er seks kømur, har eru trý tveymanskømur og trý eittmanskømur. Har er eisini ein messa og ein køkur.

Eg vildi sleppa at royna at fara til skips, tí tað ljóðar áhugavert. Eg gjørdi alt: eg kruvdi, eg pilkaði, eg royndi kryvjingamaskinu og eg var í lastini og flutti kør.

Ein dagur hjá mær umborð gekk soleiðis fyri seg: eg kom upp úr koyggjuni, fór inn í messuna og fekk mær døgurða og prátaði við

manningina í eina løtu. So fór eg upp í stýrhúsið fyri at spyrja, um vit fingu nakað í trolið, og so legði eg meg eina løtu. Seinni rópti skiparin: “Vit hála!” So var bara at koma upp sum skjótast, gera seg kláran og hála. So at arbeiða í nakrar tímar, og aftaná tað so fór eg at vaskað mær andlitið eitt sindur, síðan í messuna at fáa natturða, og so at sova aftur.

Mær dámdi avbera væl umborð, og eg lærdi nógv nýtt, sum eg ikki hevði roynt fyrr. Manningin var sera blíð at vera saman við, og teir lærdu meg t.d. pelastikk, heingiknút, posaknút, og eitt sindur av spleising og mangt annað. Eg var sera væl nøgdur við kokkin, eg haldi at tað bara vóru tveir døgurðar sum mær ikki dámdi. Eg var eisini sera glaður fyri at sigla saman við pápa mínum, sum er maskinmeistari. Eg var nakrar ferðir í maskinrúminum og sá, hvussu hann arbeiddi.

Mín boðskapur til tykkum øll, sum ynskja at royna sjólívið, er, at tað er ikki lætt at vera ítróttarmaður, um man vil til skips. Tað kann vera skjótt tjentir pengar, um fiskiskapurin er góður. Men tað er strævið lív, tí ein skal arbeiða bæði skjótt og hart og væl. Man kann eisini vera út fyri, at man ikki fær nóg nógvan svøvn. At enda vil eg eisini viðmerkja, at um man hevur lyndi til at fáa sjóverk, so er ikki best at fara til skips. Men um man velur tað, **so far um summarið. ;D**



**Partrolarin Stjørnan**

# Túrurin við polarhav

*Tað er cool at vera umborð. Har fært tú alt, tú kanst eta, og tú fært so nógvar sodavatn, sum tú vilt, og tú sleppur at luttaka í øllum, sum teir gera. Har eru fittir menn umborð og ein kokkur, sum ger ultragóðan mat.*

BENJAMIN SEVDAL

Polarhav er eitt fínt skip. Har er nógv at gera umborð. Polarhav ein partrolari. Hann og Stjørnan fiska saman. Skipið er ikki gamalt. Tað er væl gjørt, men tað er ikki so nýtt. Til dømis er eitt nýtt skip gjørt. Tað er Tróndur í Gøtu.

Tróndur í Gøtu var sín fyrsta túr fyri 3-5 vikum síðani. Tað gekk ikki so væl. Tá teir høvdu siglt 1-3 dagar, brotnaði skrúvan. Teir fóru so til Vejle, og har hava teir so gjørt hann í ordan, og hann er hann akkurát komin heim aftur frá Vejle.

Umborð á Polarhav sleppur tú at gera nógv. Tú sleppur at vera við í øllum, sum teir gera. Tú sleppur at vera í lastini og ísa, og tað er nokk tað lættasta arbeiði umborð á Polarhav. Tú kanst eisini skilja fisk - tosk og hvíting, og tað er eitt av tí, sum man ger nógv av umborð. Og so er tað kryvjingin, og tað er hart arbeiði.

Arbeiðstíðin er at arbeiða í umleið 6 tímar og hava 12 tímar frí. Men tú fært bara 8-10 tímar frívakt, tí at Polarhav skal eisini hjálpa Stjørnuni at lína upp. Tað verður gjørt við, at ein lína verður kastað yvir til Stjørnuna. Tað ger so, at teir kunnu lína upp og taka trolið inn. Tað sleppur tú eisini at vera við til at gera. Hesir bæði skipini skulu hava umleið




300 kør av fiski fyri at fáa fulla last. Normalt tekur tað 5-10 dagar at fáa fulla last, men um tað viðrar illa, kann tað taka meira enn 10 dagar. Men tað kann eisini ganga skjótari at fáa fulla last. Heykur var bara úti í 3 dagar og fekk fulla last. Manningarparturin tann túrin var 24,000 krónur fyri at vera 3 dagar úti! Tað sigur seg sjálvt, at tá hava teir arbeitt ræðuliga nógv og brotið vakt.

Og hetta er sirka alt, sum tú gert umborð á Polarhav ein vanligan túr og sum praktikantur.

# Farmakonomiskar upplivingar

*Nógv søkja praktikkpláss, har tey gjarna vilja arbeiða sum vaksin, onnur har tey kunnu gera minst møguligt til nyttu, men summi søkja fyri at uppliva nakað! Nakað, ið tey kanska ikki fara at uppliva aftur. Míni ráð eru at bara royna.*

ABIGAIL FRÍÐA GAARDLYKKE

Aftaná fleiri telefonsamrøður og teldupostar, fekk eg í seinastu løtu eitt praktikkpláss hjá Tjaldurs apoteki í Havn. Glað av at hava nakað at fara til, og tó vónsvikin av, at plássið ikki ljóðaði eins spennandi sum politistøðin, fór eg heim at pakka til ferðina. Ein vinkona hjá mær eigur eina ommu í Havn, sum vit so gistu hjá. Longu nú byrjaði alt at gerast meiri spennandi.

**Fyrsti dagurin á Tjaldurs apoteki**

Mánamorgun var spenningurin stórur. Eg mátti spyrja fleiri ferðir, hvønn buss eg skuldi taka, og nær eg skuldi fara av. Eg eri ikki so von at ferðast við býbussunum, men eg hevði fingið so greið boð um, hvar eg skuldi fara inn, og hvørjum eg skuldi spyrja eftir, at har var næstan einki at vera bangin um.

Fólkini vóru blíð, og tey hjálptu mær beinanvegin at koma til rættis. Eg fekk ein kittil og eitt navnaskelti, og eg fekk næstan heilsa uppá øll, sum arbeiddu har. Ein kona vísti mær runt í bygninginum og so sendi hon meg oman í kjallaran eftir vørum, og har vóru eisini onnur starvsfólk, sum hjálptu mær. Eg ivaðist eitt sindur, um eg hevði gjørt eitt mistak við at velja apotekið, tá ið eg hevði verið í kjallaranum eina løtu. Men aftan á pausuna slapp eg inn aftanfyri handilin at pakka sendingar. Tað var nógv lættari og stuttligari, og næmingarnir, sum vóru har, vóru fittir, og tosaðu nógv við meg.



Medisin var goymt í kjallaranum, og í kuldaskápum

**Starvsfólkini**

Á apotekinum arbeiða umleið 70 fólk, og eini 11 av teimum eru danskarar. Tey søgdu, at ringt var at fáa føroyingar at søkja inn, og tí vóru næstan bara danskir næmingar har. Tíanbetur var tað ein føroyingur, sum hevði álitið á mær, og eg noyddist ikki at tosa serliga nógv danskt.

Eg slapp at royna nógv, sum eg ikki hevði væntað. Starvsfólkini gjørdu alt fyri, at eg skuldi fáa so nógv burturúr sum møguligt, og eg var glað, tá ið eg fekk at vita, at bara útlærd kundu standa við kassan og taka fyri. Eg eri ikki beinleiðis tann besta, tá ið talan er um rokning.

**Mínar uppgávur**

Eg gjørdi so nógv ymiskt. Eg var aftanfyri í handlinum og sá, hvussu alt arbeiðið gekk fyri seg. Eg var í kjallaranum og sá, hvussu og hvar tey goyma alt medisinið. Eg slapp eisini biltúrar niðan á Landssjúkrahúsið við medisini. Tað stuttligasta var nokk at blanda sýrur. Metingin skuldi vera heilt bein, og aftaná skuldi eg skriva eina lítla uppgávu og

batchnummar. Tað var sum at hava ein stuttligan alisfrøðitíma, har man slapp at gera alt sjálvur.

**Apotekið í Runavík**

Eg var eina viku í Havn, og so skuldi eg til Runavíkar. Apotekið her er nógv friðarligari, og her arbeiða umleið 5 fólk. Men burtursæð frá at starvsfólkini vóru færri, líktist tað nógv apotekinum í Havn.

Har hendi altíð okkurt stuttligt og spennandi, og samanumtikið haldi eg at tað var sera læruríkt, og at øll kunnu fáa nógv burturúr við at hava tann rætta holdningin. So leingi sum man er villigur til at uppliva nakað, og at man tekur tað, sum tað kemur, so skal tað nokk vera ein uppliving.

# TEKO - skapandi skúli

*Tá eg skuldi í praktikk, valdi eg at fara á TEKO, ið er ein snið- og seymiskúli, sum liggur í Danmark. Eg valdi tað, tí at mær dámar ógvuliga væl at arbeiða við hondunum, at vera kreativ og finna uppá nýggj ting. Um tær eisini dámar væl sovorðið, er TEKO akkurát nakað fyri teg.*

AIMÉE JACOBSEN

## Útbúgvingarnar á TEKO

TEKO er ein skúli, har tú kanst velja at útbúgva teg sum klædnasniðgevi, sniðteknolog ella innan fyri snið og handil.

Útbúgvingin sum klædnasniðgevi tekur trý ár og er ein arbeiðis- og ungdómsútbúgving, ið er samansett av skúla og praktikkuppihaldi. Hon er býtt upp í trin: grundskeiðið tekur ½ ár, trin 1 tekur 1½ ár, og trin 2 tekur 1 ár. Hendan útbúgvingin krevur, at tú skalt velja ímillum snið, uppbygnað ella framleiðslu.

Útbúgvingin sum sniðgevi tekur 2 ár. Hon ger teg føran fyri at taka tær av arbeiðinum við at leggja til rættis, skipa og gera uppgávur innanfyri lívsstíløkið, t.v.s. møblar, pútur og gardinur.

Fyri at kunna fáa útbúgvingina innanfyri snið og handil skalt tú fyrst hava tikið útbúgving-ina sum sniðgevi, og síðan ganga í skúla 1 ár fyri at fáa útbúgvingina innan fyri snið og handil. Henda útbúgvingin er millumlong og gevur ein góðan førleika á høgum støði.

## Ein dagur í praktikkini

Dagurin byrjaði við, at eg møtti kl. 08.30, sum eg sjálvandi hevði fingið boð um. Tá byrjaðu tvær gentur at greiða frá, hvat eg skuldi gera. So teknaði eg eitt mynstur og klipti toyið út,

sum eg skuldi brúka. Kl. 11.40 var døgurða - steðgur til kl. 12.20, og so var aftur farið til verka. Eg setti meg niður við eina seymi-maskinu og seymaði tað, eg var biðin um. So var eg liðug við mína pútu og slapp heim kl. 14.30. Dagarnir hava tríggjar steðgir, ein døgurðasteðg og tveir lítlar steðgir, sum eru 10 min., ein áðrenn døgurða og ein aftaná.




**Hesa blusuna gjørdi eg, meðan eg var í praktikk. Hon er bara eitt dømi um tey tingini eg gjørdi, meðan eg var har.**

## Fakta

- Á TEKO ganga yvir 1100 næmingar, flestu av teimum eru gentur, men tó eru nakrir dreingir.
- Fyri at seyma eina vanliga blusu má ein brúka tríggjar maskinur.
- Maskinurnar, sum tey hava, eru ikki sum vanligar maskinur, sum vit hava heima. Tær á TEKO eru nógv sterkari, so sterkar, at tær kunnu seyma í gjøgnum ein fingur sum einki.
- TEKO hevur eina heimasíðu, sum eitur www.teko.dk, har kann ein finna nógv meira um útbúgvingarnar.
- TEKO hevur ongan eigara, tí tað er ein almennur skúli.

## Um TEKO

Mær dámdi sera væl at vera har, tí at eg slapp at prøva alt møguligt. Skúlin er ikki ein skúli, har ein alla tíðina hyggur niður í eina bók ella situr við einum blýanti og skrivar. Um ein hevur hug, kann hann gott seyma mammu síni okkurt, tí maskinurnar kunnu gott brúkast til annað enn skúlaarbeiði.

Um tú ert ein kreativur persónur, sum dámar væl at seyma og gera okkurt við hondunum, og ikki dámar væl at sita við nøsini í einari bók, er TEKO akkurát nakað fyri teg. Tað er ordiliga læruríkt ,og tú dugir og veit heilt sikkurt eina rúgvu at tingum aftaná, at tú hevur verið har, sum tú ikki gjørdi áðrenn.

# Formula.fo

*Eg fór til Formula í praktikk, av tí at mær dámar sera væl teldur, hvussu tær eru uppbygdar og at gera teldur í ordan. Formula er í Tórshavn, teir hava eisini eina skrivstovudeild í Saltangará, so eg valdi at fara til Havnar. Formula selur teldur og printarar, men mest til arbeiðsbrúk. Formula programmerar eisini heimasíður til onnur firmu.* ***Forstjórin hjá Formula er*** *Fróði Magnussen.*

JÓGVAN OLSEN

Meðan eg var í praktikk hjá Formula, búði eg í Havn.

Eg valdi at fara til Formula, av tí at eg var sera áhugaður í programmering. Men tá kom har, kom eg fyrst til verkstaðin, og har dámdi mær tað sera væl. Tann, sum eg var hjá, at John Olley Petersen, hann dámdi mær væl, og hann tók sær ordiliga tíð til mín. Hansara arbeiði var at umvæla teldur hjá kundum, so eg slapp eisini at prøva tað. Eg var mest á verkstaðnum saman við Olley, og har dámdi mær tað best. Eg skrúvaði upp á nógvar teldur, lat tær upp og hugdi eftir, hvussu tær riggaðu og gjørdi eisini nakrar teldur hjá kundunum í ordan.

Hjá Formula arbeiða umleið 60 fólk.

Tann eina dagin var eg á goymsluni. Har var tað ikki líka stuttligt, men har føldi eg tað ordiliga, at eg gjørdi stóra nyttu. Eg hjálpti teimum við at setta upp á hillarnar og klistra klistrimerkir, so at man veit, hvar allar vørurnar eru, tað vóru umleið 500 klistri-merkir til samans.

Eg var í goymsluni bara helvtina av degnum, og so fór eg aftur inn á verkstaðin at gera teldur klárar til sølu og at uppdadera teldur til tað nýggja Windows 7.



**Eitt "MotherBoard". Tað er høvuðskippið.**

Eg helt at tað var sera stuttligt, at teir tímdu at taka sær tíð til mín og siga, hvat teir gjørdu, og hví tað bleiv gjørt soleiðis. Onkuntíð tóku teir sær 1 tíma og lærdu meg bara okkurt um teldur, tá teir ikki høvdu so nógv at gera. Teir lærdu meg eisini, hvussu man setur eina teldu saman.

Eg hevði tað ordiliga gott í praktikk hjá Formula og fekk sera nógv burturúr.

# Bakaríið

*Stuttlig arbeiðsfólk, tíðliga upp og nokk at gera. Tað eru praktikkumstøðurnar, tá man er í praktikk á Bakarínum í Saltangará.*

HANS HELGI DALSÁ

**Hví Bakaríið?**

Mær dámar væl at fáast við mat, breyð og ymiskt sovorðið, tí helt eg, at Bakaríið í Saltangará var ein góður møguleiki at læra mangt og hvat um breyð, og hvussu tey gera breyðini.

Bakaríið er bæði ein handil og ein verkstaður í einum húsið.

Eigarin av bakarínum er ein fittur og stuttligur maður, sum fjasar og hevur tað stuttligt, so at man følir seg vælkomnan. Hann eitur Sofus Hansen.

Á bakarínum bakar man ymisk sløg av breyði, bollum og kakum og ikki at gloyma kakumann. Tað arbeiða eini 16 fólk í Bakarínum. Summi av teimum fara øgiliga tíðliga til arbeiðis. Tað eru tey, sum arbeiða á verkstaðnum. Tey møta klokkan 02:00 um náttina til arbeiðis og arbeiða til umleið 12:00. Tey í handlinum arbeiða seinri um dagin, tí tað er opið líkað til klokkan 20:00 hvønn dag uttan sunnudag.

**Nógvar ymsar arbeiðsuppgávur**

Í praktikkini slapp eg at gera alt møguligt, sum til dømis at gera bollar, fylla mjøl í kørini, sum breyðið verður gjørt í, koyra breyð-deiggið í formar og úr formunum og seta tey eina hill at kølna, at gera køkur, pitsa og mangt annað.

**Ein dagur í praktikkini**

Eg kom oman á Bakaríið klokkan 06:00 um morgunin. Eg fór beinleiðis til arbeiðis at tøma breyðformar og stilla breyðini á eina jarnhill. Aftaná tømdi eg mjølposar í karið til breyðið og fór at gera bollar og fransbreyð. Tá ið tað var farið í ovnin, var tað ein lítil pausa, har ið vit kundu fáa okkum einar tveir bollar og ein drekkamunn. Vit fóru uppá í ein vanligan køk og sótu og ótu og prátaðu. Tá ið pausan var liðug, fór eg inn í ein annan køk at hjálpa til at gera køkur og pizza, til klokkan var umleið 12:00 og slapp heim.



**Gott praktikkpláss**

Mær dámdi væl at vera har. Tað var alla tíðina okkurt at gera, og eg keddi meg ongantíð. Øll skemtaðu og høvdu tað stuttligt og tosaðu saman, meðan vit arbeiddu.

Um tú dámar væl at arbeiða við hondunum og matgerð, so er Bakaríið nakað fyri teg. Tú fært roynt teg handaliga og gert eina vøru, sum onnur skulu hava og fáa gleði av.

# Tvær vikur umborð á einum trolara er lívið

*Magnus Heinason er eitt fiskirannsóknarskip, sum nakrar ferðir um árið fer út at fiska á friðaðum økjum. Økini eru friðað, av tí at t.d. fiskur fer har at gýta, og tí at koralir eru har. Magnus Heinason er tað einasta skipið í Føroyum, sum kann hetta, av tí at hann kannar fiskarnar, t.d. hvussu stórir teir eru, hvat teir eta, hvussu nógv teir eta og mangt annað.*

TÓRI HENTZE THOMSEN

Eg var í starvsvenjing umborð á Magnus Heinason, sum hoyrir til Havstovuna í Tórshavn, tí at mær dámar væl at fiska og fáast við fisk, og eg haldi tað vera spennandi við øllum fiskasløgunum, sum eru.

Eg var umborð á Magnusi Heinasyni 01/03 til 12/03, og tað var í mínum eygum luksus. Eg slapp at gera alt møguligt umborð. Men fyri tað mesta var eg dekkari, og tað dámdi mær best. Eitt sindur negativt var allíkavæl. Man bleiv vaktur kl. 06.00, men so kom man til ein lekran morgunmat. Man fekk frí aftur kl. 18.00, og tá kundi man bara seta seg at hyggja at onkrum filmi ella fótbóltsdysti í sjónvarpinum. Men man kundi eisini, um man tímdi, fara út í fabrikkina at skera sær flak, at greipa ella gera turran fisk.

Við á tí túrinum vóru 14 fólk tilsamans umborð: 1 skipari, 1 stýrimaður, 1 maskinchefur, 1 maskinmeistari, 4 dekkarar, 1 kokkur, 4 lívfrøðingar og so eg.

Kl. 20.00 fóru vit frá húsum til Havnar, har Magnus Heinason lá. Tá ið vit vóru komin til Havnar, fóru vit fyrst niðan at vitja mammubeiggja mín og settu okkum at hyggja at donsku sendingini, X-Factor. Tá hon var liðug, fóru vit oman á kaiina og umborð.

Teir fyrstu, sum vit møttu umborð, vóru skiparin og kokkurin, sum sótu inni í messuni og prátaðu. Teir tóku væl ímóti mær, og kokkurin vísti mær runt, hvar eg skuldi sova, hvat skáp eg skuldi hava, og hvønn kopp eg skuldi brúka. Eg segði farvæl við mammu og mammubeiggjan; síðan fór eg upp á brúnna og hugdi at, ímeðan vit løgdu frá landi. Tá ið vit so vóru byrjaðir at sigla, bað skiparin meg fara at leggja meg í koyggjuna, tí at vit skuldu tíðliga uppaftur.



Aftaná morgunmat fóru allir dekkarar upp á dekkið at koyra trolið út. Tá man hevði gjørt tað, fóru allir niður í messuna aftur at práta og at eta eitt sindur meira. Menninir umborð vóru allir heilt ómetaliga fittir, og eitt er so heilt sikkurt, at fittari sjómenn finnur tú ikki. Teir lærdu meg at skera reyðsprøku, tungu og annan flatfisk til flak og eisini at greipa.

Aftaná ca. tíma fór man uppaftur á dekkið at hála trolið innaftur. Tá var tað, gongd kom í! Har var nógv at gera allastaðni á dekkinum. Í

byrjanini skuldi eg bara standa og hyggja at, hvussu teir gjørdu, tí tað var for farligt fyri meg at fara í gongd við, men eg slapp so at bløðga fiskin. Men longu 1-2 dagar aftaná slapp eg upp á dekkið at hjálpa teimum við ymiskum.

Tað, sum var sera spennandi við at vera dekkari, var at fáast við øll tey ymisku fiskasløgini. Har var toskur, hýsa, hvítingur, steinbítur, liri, havmús, rognkelsi, skøta og mangt, mangt annað. Eitt annað gott við at vera dekkari var, at vit høvdu meir pausur enn hinir.

Ein dagin datt ein dekkari uppi á dekkinum og herðablaði fór úr lið. Vit máttu fara inn við honum, og eg skuldi tá yvirtaka hansara pláss nú, tá ið eingin avloysari var. Tað var keðiligt, at maðurin bleiv skaddur, men eg slapp at yvirtaka hansara pláss, tí nú skuldi eg arbeiða við trolinum, og tað endaði við at blíva tað besta á túrinum.

Næsta dagin fóru vit til eitt øki, har teir í fjør høvdu fiskað 18 tons í einum háli. Tað ferðina stóðu teir uppi til kl. 01.00 um náttina fyri at bløðga, kryvja og koyra niður í lastina. Í hesum hálinum veit eg ikki, hvussu nógv var í, men eg veit, at tað mugu hava verið yvir 10 tons, tí at vit stóðu og arbeiddu við tí sama fiskinum í fleiri tímar. Í einum øðrum háli tann dagin vóru vit so heldigir at fáa nakrar kalvar. Tann størsti var ca. 2.4 metrar, og vit høvdu nógv stríð av at fáa hann niður í lastina.

Tá ið eg hevði verið umborð í ca. 2 vikur, og mín praktiktíð var komin at enda, landaðu vit allan fiskin á Toftum. Familjan kom út á Toftir at avheinta meg. Eg hevði skorið so nógvan fisk, at tað næstan ikki passaði inn í bilin. Tá eg var komin heim, stóð matur klárur á borðinum.

Alt var gott at koma heim til, men allíkavæl longdist mær longu eftir at sleppa til skips aftur, og tað geri eg enn. Tað, eg sakni mest, er at kunna drekka alt tað sodavatnið, eg orki, allan spenningin, og at liggja í koyggjuni, har eg svav betri enn í míni egnu song.

Tað var stuttligt at vera umborð á Magnus Heinasyni. Tað var spennandi at vera á dekkinum, tá trolið kom inn, tí at tað farligt og rokaligt. Meiningin var, at eg skuldi vera á Havstovuni, men har var ein annar sloppin inn. Men tað eri eg glaður fyri, tí so slapp eg til skips, og eg hevði ikki kunna hugsað mær eitt betri praktikpláss.

# Brimil

*Eg valdi at fara í praktikk við Brimli. Tað er eitt skip, sum ansar eftir teimum smáu bátunum, vissi teir steðga upp, ella okkurt annað hendir. Teir kanna eisini bátar, um teir hava øll pappír í ordan. Vissi tað eru trolarar, so kanna teir eisini, um meskarnir eru for stórir, og um øll trygdin er OK. Har arbeiða 12 mans á hvørjum holdi. Tað vil siga, at 12 menn arbeiða í senn, og 20 fólk arbeiða á kontórinum á landi.*

KJARTAN PETERSEN

Eg valdi at fara við einum sjóverjuskipi, tí eg vildi út at sigla, og eg tímdi ikki at fiska. So tað var ein góð loysn at fara við Brimli, og eg fekk hugskotið frá lærarunum. Umborð gjørdi eg eitt sindur av øllum. Eg hjálpti øllum umborð: í køkinum, á brúnni og niðri í maskin-rúminum.



**Brimil**

Ein dagin fingu vit at vita, at ein maður, sum var einsamallur í einum báti, var upp-steðgaður. Motorurin køldi ikki orduliga, so vit máttu sleipa hann inn til Eiðis. Tá ið vit komu út aftur, fingu vit at vita, at vit skuldu sleipa ein afturat. Meðan vit sigldu inn, fingu vit aftur at vita, at ein annar bátur bíðaði eftir at blíva sleipaður. Men tað bleiv for leingi at bíða eftir okkum, so Magnus Heinason skuldi sleipa hann inn, so fór eg at slappa av hugdi í sjónvarp seinni um kvøldið.

kl.21:47 fekk Brimil boð frá MRCC, at TG 686 Tanganes tók vatn inn, og kláraði ikki at halda lens sjálvir. Tanganes var staddur 13



fjórðingar í ein útnyrðing úr Mýlingi. Brimil var tá 16 fjórðingar frá Tanganesi, og tað tók ein tíma at sigla, við fullari kraft á maskinunum. Kl. 22:50 kom Brimil til Tanganes og annar skjóttgangandi báturin vóru sendir yvir við 2 lensipumpum. Kl. 23:26 var maskinrúmi lens og so var hildið tørn við tí einu pumpuni, meðan siglt var til lands. Sjógvur, sum kemur í kjølin á bátinum, rennur allur aftur í maskinrúmið. Tanganes sigldi inn á Klaksvík við monnunum av Brimli umborð, og Brimli siglandi tætt hjá. Komið var á Klaksvík um 5 tíðina um morgunin. Móti morgni var lekin funnin á bakborðssíðu á stevninum omanfyri vatngangin. Tá Tanganes var úti í sjónum rann inn, men nú hann lá við bryggju, var lekin hildin uppat.

# Matas

*Matas ein handil har tey selja sínar egnu vørur við sínum egna merki, men eisini vørur hjá Aloevera, Max-fator, L´OREAL, Hugo boss, og so nógv onnur kend merkir. Tey selja eisini medisin og aðrar góðar vørur, og man fær turrar hendur, tá man arbeiðir í Matas.*

MARIN KASTALAG

Handilin var skipaður soleiðis, at har var ein veggur við medisini og ein veggur við hárkurum og hárliting. Ein veggur var við kremi, og ein veggur hevði vørur hjá Max-factor. Eisini var ein veggur, sum vit kallaðu strípuveggin, tí har eru vørur hjá Matas sjálvum. Ein vegg, kallaðu tær baby-veggin, og so var ein veggur við luktilsi. Altso har vóru bara øll produktir og ting til fólk, nógv medisin og nógv make-up, og nógv krem og nógv shampoo og ting, sum eg ikki ein gang visti, hvat var til. Lagrið var tað minsta, eg hevði sæð, altso av einum lagri at vera. Tað var rættiliga lítið, og so var ein kaffistova, eitt lítið WC og so ein stórur handil.

Eg skuldi hála vørur út og koyra nýggja vøru inn í handilin, og tá skuldi eg bara taka kanska ein dunk av Aloevera shampoo og Aloevera kremi. Um tað mangladi meira, skuldi eg taka meira og hála út inni á lagrinum, og so skuldi eg seta ta nýggju vøruna innast á hillina. Um har var ein vøra, sum var útgingin, skuldi eg bera hana inn.

Handilskonurnar vóru nokk so fittar, men tær skuldu vera eitt sindur strangar, so tað vóru tær inn ímillum. Men tær vóru eisini festligar og slatraðu eitt sindur. Men tað er nakað, man ger, tá man er til kaffipausu. Har, sum eg var, arbeiddu Miriam, Vivian, Esther, Malan, Manja og ein onnur, sum eg ikki minnist navnið á.

Eina ferð klipti nótar í 4 – 5 tímar. Tað var nokk so hugnaligt, tí tá sótu tvær aðrar og koyrdu neglalakk á nótarnar, og ein tók bíløt til sítt tema, sum hon hevði hesa vikuna. Tað var eitt brúdleypstema, og har var ein undurfullur kjóli mitt í handlinum, og við rútarnar var ein konfirmatiónskjóli. Har skuldi eg so heingja hesar nótar upp. Tað var ikki so leingi at heingja nótarnar upp, men tá eg hevði klipt í 4 – 5 tímar, hevði eg nokk so ilt í fingrunum.

Eg hevði ein dag, sum eg skuldi arbeiða frá 10 – 17. Eg skuldi seta shampoo og krem á eitt torg, sum tær kallaðu tað. Tað er eitt borð við einari hill á. Tað tók næstan allan dagin, tí alt plássið skuldi brúkast. Man mátti mest sum ikki síggja borðplátuna. Eg skuldi eisini gera eitt sovorðið torn tann dagin á hetta sokallaða torgið. Tað var nokk so skeg, tí eg mátti taka tað niður tvær ferðir, tí tað mátti flytast. Tað var ordiliga stravið, men fínasta slag.

Eg hevði nakrar deiligar dagar har, og konurnar vóru super. Men har var eisini okkurt keðiligt, til dømis tað, at eg gjørdi fyri tað mesta tað sama. Men tað var av tí, at reglarnar vóru soleiðis, at praktikantarnir ikki sleppa at standa við kassan, taka telefonina, ella bestilla vørur. Praktikantar kunnu heldur ikki hjálpa kundunum. Um ein kundi kom til mín, so skuldi eg finna eina, sum arbeiddi har. Eisini var tað keðiligt, at man fær rættiliga turrar hendur av at bara seta nýggja vøru út í handilin, og neglabandið slitnaði nokk so

nógv av tí, og so skuldi man allatíðina smyrja okkurt krem á hondina.

Eg búði í Havn, ímeðan eg var í praktikk. Tað var ikki so stravið at koma upp, og eg mátti taka bussin oman í SMS og heim aftur.

# Landssjúkrahúsið

*Eg gekk við einari hjartamaskinu í fleiri tímar og fekk útslett av tí. Mátaði blóðtrýst hjá mær og øðrum. Skrellaði yvir 55 gularøtur (uml. 11kg). Serveraði mat til patientar og nógv annað. Tað er so ótrúliga nógv og ymiskt arbeiði á Landssjúkrahúsinum. Eg vil heita á øll at prøva tað, um tit eru áhugaverd í læknum ella øðrum á sjúkrahúsinum, tí tað er sera spennandi og læruríkt.*

ESTER KJELNÆS



**So nógv ymiskt**

Eg var í praktikk á Landssjúkrahúsinum. Tað er eitt stað, ið øll, sum fara har, kunnu fáa hjálp, líkamikið húðfarvu ella aldur. Á Landssjúkrahúsinum eru uml. 800-900 fólk, sum arbeiða við nógvum ymiskum. Summi eru læknar, sjúkrasystrar, kokkar, portørar og nógv annað. Har er sera strong tagnarskylda; tú mást ikki siga nakað, um hvønn tú sært, ella hvat tú hoyrir um. Um tú fortelur upplýsingar um patientar víðari, kanst tú missa arbeiði.

Á Landssjúkrahúsinum, verður arbeitt nógv við at hjálpa fólki. Sjúk fólk koma inn har, og læknar og onnur gera alt hvat tey kunna fyri at hjálpa teimum.

Eg fór í praktikk á Landssjúkrahúsinum, tí at eg vil gjarna arbeiða har í framtíðini, og tí at eg var so spent eftir at prøva tað. Eg veit ikki, hvat eg vil arbeiða við, tá eg veri vaksin, men tað skal vera okkurt har eg kann hjálpa fólki.

Tá eg var á praktikk á Landssjúkrahúsinum, fekk eg eitt skema, sum vísti, hvar eg skuldi vera hvønn dag. Eg var á 7 ymiskum deildum; á føðideildini, í goymsluni, í køkinum, hjá kostráðgeva, í fysioterapiini, á rannsóknarstovuni (laboratorii) og á seingjadeildini. Eg møtti hvønn morgun klokkan 8:30-9:00, og fekk frí klokkan uml. 15:00.

Tá eg var á føðideildini, var eg við til barnakanningar við einum barnalækna, eg sá nýføðingar, skanningar og annað.

Tað ljóðar rættuliga keðiligt at vera á goymsluni, men har er eisini spennandi og nógv at gera. Har gjørdi eg pakkar, ið skulu sendast út til fólk kring landið. Á goymsluni eru meira enn 7.000 ymisk ting, har øll hava eitt rætt pláss.

Í køkinum var sera stuttligt at vera. Vit gjørdu rommkúlur, kakur, smyrjibreyð og flustu 55 gularøtur (yvir 11 kilo).

Hjá kostráðgeva er ikki so nógv at gera. Har koma serliga fólk, sum hava problemir við hjartanum fyri at fáa hjálp til at eta sunt og tapa seg. Men eisini tey, sum eru ov kløn, koma har.

Rannsóknarstovan (laboratorii) er nógv størri, enn eg hevði væntað. Har eru nógvar maskinur, sum kannað blóð og annað. Vit tóku ein blóðprøva av mær, og so slapp eg at kannað, hvørja blóðtýpu eg havi. Tað var sera spennandi.

Tann síðsta dagin var eg á tá medisinsku seingjardeildini. Tað hevur einki við sengur at gera. Har eru patientar, sum hava fingið hjartaoperatiónir. Eisini um fólk hava CTD, fara tey har í eina tíð. Tá eg kom har, fekk eg eitt apparat sett á kroppin. Tað vóru 5 “súgvikoppar”, sum høvdu nógvar leidningar í. Tað fór so í eina lítla maskinu, sum eg hevði hangandi um hálsin. Hetta vísti á einum telduskermi, hvussu hjartarytman var. Hesum gekk eg við í nakrar tímar. Um eg gekk ella stóð uppi, bleiv talið høgt. Men um eg bara sat ella lá, var tað lágt, tí at hjartað ikki arbeiddi so hart. Eg tók eisini blóðtrýstið í bæði armum og fótum.

Mær dámdi sera væl at vera í praktikk á Landssjúkrahúsinum. Tað var sjálvandi ikki líka stuttligt at vera allastaðni. Men tað var rættuliga cool at ganga har í hvítum klæðum og við navnaskelti og viðhvørt við hárneti og í kittli. Eg lærdi nógv um, hvussu tað er at arbeiða har, og hvussu nógv ymiskt arbeiði eru har.

Um tú ikki hevur áhuga í at vera ein, sum arbeiðir við fólki, helst sjúkum, so er hetta ikki eitt stað at fara í praktikk hjá tær. Men ert tú ein, ið tímir væl at læra og er áhugaður í hesum, so burdi tú farið. Men minst til, at tað ikki bara eru læknar, ið arbeiða á einum sjúkrahúsi, men eisini fólk ið fáast við mat, bilar, teldur og sum vaska.